Auto Service:

# Aircondition tænasta til øll bilmerkir

Áðrenn farið verður í summarferiu við bilinum, er tað av stórum týdningi, at aircondition skipanin í bilinum er tøtt og virkar optimalt.

Bilverkstaðurin hjá Auto Service hevur serliga útgerð til eftirlit og viðlíkahald av teimum aircondition skipanum, sum eru í øllum nýggjum bilum.

Tað er soleiðis, at airconditionskipanir í bilum skulu røkjast og haldast við líka, annars er vandi fyri, at tær ikki rigga, sum tær skulu. Tað er eitt sindur ymiskt, sum bilverksmiðjurnar mæla til hesum viðvíkjandi, men eftirlit annaðhvørt ár er nokk so vanligt.

Arbeiðsgondin er tann at anleggið verður fyrst tømt fyri freon, síðan verður vakuum sogið inn í skipanina, áðrenn freon verður fylt á aftur. Eftir tað verður ein tættleikaroynd gjørd, kondensatorin verður reinsaður og ventilar og samankomingar verða eftirspent. Eisini verður kompressarin kannaður fyri oljuleka.

Kølievnið R134a (freon) minkar við tíðini, og verður skipanin tóm, er vandi fyri at kompressarin tekur skaða, og tá kann talan verða um eina dýra umvæling, sigur Otto Andreasen frá Auto Service, sum leggur afturat at vanliga kostar eitt slíkt eftirlit við øllum kr. 1.375.00, men í løtuni hava vit summartilboð upp á einans kr. 895.00

**mg**





















